TAÐ ER TÍN AVGERÐ 2

Dátueftirlitið
Reyngøta 33 · Postsmoga 300 · 110 Tórshavn
Tel. 309100 · post@datueftirlitid.fo · www.datueftirlitid.fo

FØROYATELE
Klingran 1 - 5 · Postsmoga 27 · 110 Tórshavn
Tel. 303030 · ft@ft.fo · www.ft.fo

MIÐLARÁÐIÐ
Niels Winthersgøta 7 · Postmoga 124 · 110 Tórshavn
Tel. 322000 · post@midlarad.fo · www.midlarad.fo

SSP
skúli · sosialir myndugleikar · politi
SSP ráðgevingin · Barnaverndarstova Føroya
R.C. Effersøesgøta 30 · FO 100 Tórshavn
Tel. 222498 · www.bvs.fo

Dátueftirlitið hevur givið út bóklingin í samstarvi við Føroya Tele, Miðlaráðið og SSP.

Ábyrgd: Ingunn Eiriksdóttir, Dátueftirlitið
Verkætlanarleiðari: Rannvá Sólheim, Dátueftirlitið
Uppseting og layout: ANNI**JANNI**
Myndir: Sunrid í Gong
Prent: Føroyaprent

VALIÐ ER TÍTT

Hesin bóklingur er til tín. Hann er bæði um tað stuttliga og gevandi, sum tú kanst gera á netinum, men eisini hvat tú kanst gera, so tú ikki kemur illa fyri á netinum.

Sumt visti tú kanska frammanundan, meðan annað er, sum tú kanska ikki visti. Vit vóna, at bóklingurin kann føra til lívligt prát um, hvussu tú kanst nýta internetið uppá tann góða mátan. Endamálið er at læra teg at taka avgerðir, sum eru rættar fyri teg.

Tað er tín avgerð.

...var tað TÚ, sum skuldi spæla KUL?

Hví sendi tú hatta býttisliga sms'ið? Kanska gjørdi tú tað til stuttleikar - men hvussu stuttligt bleiv tað so?

Sms'ið fór skjótt út til nógv fleiri enn tú ætlaði, ikki sannheit? Og knappliga er tað tín skyld, at ein í flokkinum ikki torir í skúla.

Hevði tað ikki verið betri, um tú hevði havt hugsað teg um?

Hugsa teg um, áðrenn tú trýstir á "send".

Nógv hava eyguni við TÆR!

HALLÓ... ER NAKAR HAR...??? Ja! Hundraðtals! Túsundtals! Milliónir! Hevur tú hug, kanst tú røkka allan heimin á internetinum. Og onkuntíð eisini, tá tú ikki hevur hug.

Internetið er stuttleiki. Tú kanst tosa við vinir á Skype, vitja heimasíður teirra, síggja filmar á YouTube, taka tónleik niður og vísa øðrum tínar myndir. Á internetinum er lætt at vera bæði hoyrdur og sæddur.

Tað var øðrvísi, tá tíni foreldur vóru ung. Tey vóru næstan noydd at blíva heimskend íttróttarfólk, ella sangarar, um stóra verðin skuldi leggja merki til tey. Í dag er lættari.

Onnur síggja teg

Ert tú við í ítróttarfelagi? Um so er, hevur felagið kanska lagt myndir av tær út á heimasíðu sína. Eisini onnur kunnu leggja myndir av tær út á netið, t.d. tá tú ert í føðingardegi, saman við vinum, familju ella til okkurt tiltak.

Onnur kunnu lættliga síggja upplýsingar um teg á netinum. T.d. við at skriva navnið inn á leitimaskinuna www.google.dk, kunnu nógvar síður við bæði upplýsingum og myndum koma fram. Síðani kunnu tey gera sær eina mynd av tær sum persóni.

Tú kanst krevja, at skeivar ella ófullfíggjaðar upplýsingar verða rættaðar.

HVAT HELDUR TÚ?

Hevur tú nakrantíð lagt tilfar út á internetið um teg sjálvan ella onnur, sum tú síðani angraði. Um so er, hví angraði tú tað?

Hava onnur lagt myndir av tær út á internetið? Helt tú, at tað var í lagi? Hevði tú givið loyvi til tað?

UPPGÁVUR:

Far inn á www.google.dk og skriva navn títt í skrivifeltið.

- Hvat kemur fram?
- Følir tú, at hetta gevur ta røttu myndina av tær?
- Hví/hví ikki?
- Ger tínar egnu reglur fyri tað, tú leggur út á netið.

Hvat er Tryggari internetdagur?

- Leita eftir tí á netinum.

Títt loyniorð er TÍTT!
Tað má ongantíð latast øðrum persóni.

TÍDINDA KASSIN

KANNING 2010

Sambært kanning hjá Dátueftirlitinum, hava 53% av næmingunum í 3. flokki og 73% av næmingunum í 4. flokki vangamynd á Facebook.

Kanningin vísir eisini, at 17% av næmingunum í 3. flokki og 39% í 4. flokki leggja myndir ella filmar út á netið.

30% av næmingunum í 3. flokki og 23% í 4. flokki leggja myndir ella filmar av øðrum fólkum út á netið uttan at spyrja um loyvi.

ORÐABÓKIN

persónsvernd = tað finnast mørk og reglur fyri, hvussu onnur kunnu brúka upplýsingar um teg.

leitimaskina = tænasta á netinum, har tú kanst leita eftir upplýsing, t.d. Google.

privat = nakað, sum er persónligt og bara hevur við teg at gera.

Hatisíða á Facebook

Dømi er í Føroyum um, at næmingar hava stovnað hatisíður á Facebook um aðrar næmingar. Hetta **SKAL** ikki koma fyri.

Hugsa tær, um tað var teg, tað gekk út yvir!!!

Upptøkur av lærara á YouTube

Dátueftirlitið hevur fingið kunnleika til, at næmingar hava tikið upp film við fartelefon av lærarum og lagt hetta á YouTube.

Hetta eigur bert at verða gjørt við samtykki.

Kelda: Dátueftirlitið

UPS!!

Mugu vísa øðrum VIRÐING!

ER TAÐ SO FARLIGT, HA? Tað var jú bara til stuttleikar. Eg meinti onki við tað. Helt ikki, at tú fórt at taka tær tað so nær. Og eg sendi tað bara til vinmannin. Ongin annar sá tað. Tað passar!

Ynskir tú at leggja andlitsmyndir av vinfólkum tínum út á netið, eigur tú fyrst at spyrja tey um loyvi. Ella hevur tú eina andlitsmynd á fartelefonini, sum tú ætlar at senda víðari, mást tú eisini spyrja um loyvi til tað. Tí sjálvt um tú heldur myndina vera skeg, er ikki vist, at vinmaðurin heldur tað sama. Reglan er ikki tann sama við støðumyndum, har onki samtykki krevst.

Lætt at misskilja

Við telduna á kamarinum virkar alt minni álvarsamt enn úti í tí "veruligu" verðini. Tú kanst lættliga koma at siga okkurt, sum tú ikki hevði sagt hart, um tit sótu saman. Eisini kunnu tit lættliga misskilja hvønn annan. Tá ið tú samskiftir á netinum ella við fartelefonini, sært tú ikki reaksjónirnar hjá tí, sum tú skrivar saman við. Tú hoyrir ikki røddina, sært ikki andlitið og kropsmálið. Tí kann vera torført at vita, hvussu onnur taka ímóti tí, sum tú skrivar.

Internetið og fartelefonin geva næstan óavmarkaðar møguleikar at tosa við vinirnar um tað nýggjasta, býta myndir og kanska eisini loyndarmál. Tíverri lata tólini eisini upp fyri møguleikanum at gera onnur kedd. Summi uppliva, at tann besti vinurin sendir myndir víðari, sum ongin annar skuldi síggja. Summi uppliva, at aðrir næmingar í skúlanum skriva ljótt um tey á internetinum. Summi finna býttar myndir av sær sjálvum á heimasíðunum hjá øðrum.

Tín ábyrgd

Eins og blaðstjórin hevur ábyrgdina av sínum blaði, hevur tú eisini ábyrgdina av tí, sum tú leggur út á internetið. Tá tú hevur lagt tekstir og myndir út á netið, er torført at strika tilfarið heilt. Tað kann verða avritað og lagt á heimasíður, tú hvørki hevði vitjað ella hoyrt um, og sum tú ikki vilt verða settur í samband við.

Tað, tú ikki gert í veruliga lívinum, eigur tú heldur ikki at gera á netinum.

EITT TÝÐILIGT JA!

Hvørja ferð onkur leggur andlitsmyndir av tær út á netið, eiga tey fyrst at spyrja teg um loyvi. Men tú eigur bara at siga JA, um tú meinar JA. Angrar tú tað aftaná, sig so frá hesum. Tá skulu tey, sum hava lagt myndina út, taka hana burtur beinanvegin.

Dátueftirlitið kann hjálpa tær á tlf. 309100

HVAT HELDUR TÚ?

Mr. KUL við knapparnar. Ert tú eitt sindur skrappari, tá tú skrivar saman við øðrum á netinum, enn tá tú tosar við tey á gøtuni, ella í skúlanum?
Hví? / Hví ikki?

Happing ella arging? Er nakar munur á at happa og arga? Hava tú ella onnur, sum tú kennir, verið argaði ella happaði á internetinum, ella á fartelefonini? Hvat hendi? Segði tú einum vaksnum frá tí?

Tað er tín rættur at vera í friði. Vit hava øll okkurt, sum vit ikki vilja geva øðrum atgongd til. Ikki tí at tað er kriminelt ella ikki tolir dagsins ljós, men bara tí at tað er privat. Hvat heldur tú er privat?

Onkur heldur, at skúlarnir áttu at banna fartelefonum á skúlaøkinum. Hvat heldur tú?

UPPGÁVUR:

Í Føroyum hava vit talu- og skrivifrælsi. Hvat merkir tað? Nýt internetið at finna út av hesum. Nú vit hava talu- og skrivifrælsi, er so onki mark fyri, hvat vit hava loyvi at siga og skriva?

Summi uppliva, at aðrir skúlanæmingar happa tey. Tað kann vera sum happing á netinum, við sms boðum, ella beint í andlitið. Hvussu kann hvør tykkara í flokkinum hjálpa til, so happingin kann steðga í skúlanum? Ger uppskot til reglur fyri, hvussu tit eiga at vera móti hvør øðrum; eisini tá tit eru á internetinum, ella nýta fartelefonina.

Eru støður og stød, har vit hava rætt at vera í friði og tískil ikki verða filmaði ella avmyndaði? Farið saman í bólkar og gerið reglur fyri, hvat tit kunnu avmynda og filma - og hvussu tit við góðari samvitsku kunnu nýta myndirnar.



FAKTA

Ein kanning hjá Dátueftirlitinum í 2010 vísti, at fimti hvør næmingur í 3. flokki hevur upplivað at onkur gjørdist súrur/keddur av einum sms'i, sum tey høvdu sent.

Í 9. flokki hevði helvtin av næmingunum upplivað hetta.

TOSA VIÐ ONKRAN

Verður tú happaður, antin tað er við smsi, interneti, ella í skúlagarðinum, mást tú seta teg í samband við onkran, sum kann hjálpa tær; til dømis foreldur og lærarar. Tað er sera umráðandi. Heldur tú tað vera trupult at tosa við ein vaksnan, tú kennir, kanst tú ringja ókeypis til TÚ & EG Ráðgevingina, sum svarar á tlf. 80 70 10. Eisini kanst tú kjatta dulnevnt við ein ráðgeva á **www.eg.fo**

TÍDINDA KASSIN

Myndir av naknum næmingum á netinum

Dømi eru í Føroyum um, at næmingar í skúlanum eru avmyndaðir og filmaðir naknir í brúsurúmum og á vesum av øðrum næmingum. Myndirnar eru í summum førum sendar víðari til onnur í flokkinum, og eisini eru filmar lagdir á YouTube. Næmingarnir verða sjálvandi ógvuliga keddir av hesum, og ofta vilja tey ikki aftur í skúla.

Tað er revsivert at taka slíkar myndir.

Kelda: Dátueftirlitið

ORÐABÓKIN

støðumynd = mynd av einum ella fleiri persónum, har tað er **støðan,** t.d. spæl í skúlagarðinum, sum skal vísast.

andlitsmynd = mynd av einum ella fleiri persónum, har tað er **andlitið,** sum skal vísast.

...var tað tínum egna LÍTLABEIGGJA, tú bleivst forelskað í???

Tað er eitt sindur flóvisligt, ikki sannheit? At dreymasjeikurin, sum tú kjattaði við í fleiri vikur, vísti seg at vera tín egni lítlibeiggi, sum fjasaðist við tær.

Kanska ert tú eisini eitt sindur kedd, tí tú vart eitt sindur forelskað?

Tað er mega pínligt at gera slíkt. Men hvussu kanst tú vita fyri heilt vist, hvønn tú kjattar við á netinum?



Í GJÁR VAR EG MR. KUL 17 ÁR: HALLÓ! HENDIR NAKAÐ HER? Eg eiti Ronny. Mær dámar heavy metal og gentur við stórum boppum. Ert tú við, ella... :o)

Í DAG ERI EG FITT GENTA 11 ÁR: Hey, eg eiti Lisa og verði skjótt 12 ár. Eg elski Hannah Montana og haldi ross vera sooo fitt. Kanska kunnu vit hittast onkuntíð?

Hvønn kjattar tú við - VERULIGA?

Upplýsir tú títt veruliga navn á netinum, ella ert tú dulnevndur? Ivaleyst kenna vinir tínir teg, men onnur vita ikki, hvør goymir seg aftanfyri dulnevnið - hvørki títt veruliga navn, hvussu gamal tú ert, ella um tú ert genta ella drongur. Á netsíðum sum Facebook er vanligt at nýta fult navn og kanska eisini aðra upplýsing um persónin. Á øðrum síðum er í lagi at vera dulnevndur.

Satt, ella...
Tað kann vera spennandi at seta saman ein profil, har tú sjálvur kanst velja kyn, aldur, tjóðskap, áhugabólkar og hárlit. Í eitt kvøld kann tað vera stuttligt at vera 20 ár og megastjørna. Men tað er ikki bara tú, sum kanst stovna ein wannabe profil. Kanska eitur tann superfitta gentan á Arto ikki Helena kortini. Og kanska er hon ikki 12 ár. Kanska eitur Helena í veruleikanum Rasmus og er 47 ára gamal?!

Á internetinum kanst tú hitta nógv spennandi fólk. Flestu teirra eru av fittastu fólkum. Men tíverri kunnu eisini vera persónar, sum ikki eru ærligir um hvørjir teir eru, og hvat teir vilja. Tíbetur er tað sjáldan nakað ljótt, sum hesir gera, men kortini mást tú gera tær greitt, at tað kann henda.

Ver varin, tá tú kjattar á netinum.

TÍDINDA KASSIN

HVAT HELDUR TÚ?

Um tú upplivir okkurt keðiligt á netinum - fært eina ljóta viðmerking, ella kemur inn á eina vemmiliga síðu - hvat gert tú tá? Velur tú at tiga við tí, ella tosar tú við onkran um tað?

Hevur tú nakrantíð kjattað við onkran á internetinum, sum tú ikki kendi? Heldur tú tað vera í lagi at senda myndir og aðra privata upplýsing til fremmand fólk, sum tú hittir á netinum?

UPPGÁVUR:

Á netinum fært tú vinarumbønir og verður bjóðaður í ymiskar bólkar.

Kjakist og gerið uppskot til reglur um, hvørjar bólkar og vinarumbønir tit halda vera rætt at góðtaka.

Tosið um vandan við følskum profilum.

ORÐABÓKIN

profilur = tín egna skráseting av upplýsingum og myndum í einum netfelagsskapi.

dulnevndur = at tú ikki upplýsir títt rætta navn, hevur eitt kelinavn.

falskur profilur = skráseting av einum persóni, sum tú sigur teg vera á netinum, men sum tú ikki ert í veruliga lívinum.

Falskir profilar

Kanning hjá Dátueftirlitinum í 2010 vísti, at 7% av næmingunum í 4. flokki høvdu latið sum um, tey vóru ein annar persónur á netinum. Í eldru flokkunum, var tað meira enn fjórði hvør, sum hevði latið sum um tey vóru ein annar.

Ert tú vísur í, at tann persónurin, tú kjattar við, veruliga er tann persónurin tú heldur?

Kelda: Dátueftirlitið

Visti tú, at navnið á einum bólki á netinum kann broytast?

NEI!!!

Hvør skal ráða?

NÚ ER NOKK! Kamarshurðin brestur upp og inn kemur ein ill mamma. Tú støkkur upp - hevur sitið og leitað og kjattað á netinum í nakrar tímar. Hvat er galið? Kann tað vera at tú hevur brotið avtaluna um, hvussu leingi tú kanst vera á netinum, ella er kanska ongin avtala?

Í lagi at kanna?
Nøkur børn uppliva, at foreldrini fara í telduna at kanna, hvørjar heimasíður tey hava vitjað. Onkur foreldur vilja eisini síggja fartelefonina fyri at kanna, hvørji sms barnið hevur sent og fingið. Nógv foreldur siga, at tey gera hetta fyri at verja barnið móti óndum og keðiligum upplivingum. Onnur foreldur halda ikki, at tað er í lagi at kanna telduna ella fartelefonina hjá barninum.

Skúlar eiga at hava reglur fyri, hvussu næmingar kunnu nýta internet, teldu og fartelefon.

Nógvar familjur hava líknandi reglur, meðan aðrar familjur als ongar avmarkingar hava. Summi ung vilja halda, at heima hjá teimum eru reglurnar alt ov strangar og tí eru tey øvundsjúk inn á vinirnar, sum hava loyvi til so nógv meira. Men kanska sakna tey, sum hava loyvi til alt, at onkur eisini setti teimum mørk. Mørk fyri hvussu nógvar tímar, tey kunnu nýta við telduna, hvørjar heimasíður eru bannaðar, og hvørji spøl tey sleppa at spæla á internetinum.

Onkuntíð er tað í lagi og hent at hava reglur. Tú kanst vera við at gera reglurnar, sum skulu galda fyri teg.

Um foreldur kanna telduna ella fartelefonina hjá barninum, eiga tey at siga barninum frá, áðrenn hetta verður gjørt.

HVAT HEVUR SKÚLIN LOYVI AT KANNA?

Vanliga hevur skúlin ikki loyvi at hava eftirlit við internetnýtsluni hjá næmingunum. Hendir nakað ólógligt, kann løgreglan nýta loggin á servaranum hjá skúlanum, til at finna tann seka. Dátueftirlitið mælir til, at skúlin avmarkar sítt eftirlit við næmingunum og skal vera opin um, hvat verður skrásett og hví.

EYGLEIÐING

Í 2009 hildu 65% av føroyingum at tað er í lagi, at foreldur eygleiða samskiftið hjá børnum undir 15 ár, tá tey eru á internetinum.

Kelda: Gallup fyri Dátueftirlitið

TÍDINDA KASSIN

HVAT HELDUR TÚ?

Hevur tú reglur fyri, hvussu tú kanst nýta fartelefonina og telduna? Vart tú við til at gera reglurnar? Ert tú samdur við reglunum, sum tú skalt fylgja?

Hví heldur tú, at nógv foreldur kanna loggin í telduni og sms boðini í fartelefonini hjá barninum?

Hava tíni foreldur rætt at vita alt um teg og hvat tú gert? Hvørjum tú ert saman við, hvat tit práta um, hvat tit gera saman? Hevur tú rætt at vita alt um tey vaksnu og hvat tey gera?

Onkur foreldur leggja myndir av børnum sínum út á Facebook og aðrar síður, so at onnur kunnu síggja teirra familju. Er tað okey? Eiga tey at spyrja børnini um loyvi? Er tað í lagi at leggja myndir út av einum, sum er so ungur, at hann ella hon ikki kann siga sína hugsan?

UPPGÁVUR:

Fleiri kjattsíður hava aldursmark fyri sínar brúkarar. Finnið út av, hvat aldursmarkið er á Facebook, Arto, og øðrum síðum. Hví halda tit, at tey seta aldursmark á? Í biografinum góðtaka tey flestu setta aldusmarkið. Virðir tú aldursmarkið á netinum líka nógv sum tað í biografinum? Hví? / Hví ikki?

Ongum dámar, at onnur sneyta í teirra privatlívi, antin tað er í kommoduskuffuni ella á telduni.

Eru upplýsingar um teg ella tíni vinfólk á netinum, sum heldur áttu at ligið í eini kommoduskuffu? Hyggið á egnar profilar og á profilar hjá vinfólkunum.

Smíl, tú verður filmaður :-)

Veitst tú av, at næstan allir handlar hava vakmyndatól? Vakmyndatólini filma teg ímeðan tú ert í handlinum. Upptøkurnar verða ofta goymdar í 14 dagar.

Kelda: Dátueftirlitið

ORÐABÓKIN

loggur = yvirlit yvir ferðsluna á netinum, til dømis hvørjar síður tú hevur vitjað og hvønn tú hevur tosað við á MSN.

eygleiðing = t.d. tá foreldur halda eyga við børnum, lærarin sneytar í tínum telduposti ella tá tú verður filmaður við vakmyndatóli.

...hatta er skeivt! - hví sigur tú tað?
- tí eg veit at “Den lille Havfrue” ikki situr við Tinganes!
- ja men, tað havi eg lisið á internetinum...

Tað hevur sína orsøk, at til dømis journalistar læra at eftirkanna sínar keldur væl. Fólk skriva á internetið og fólk minnast ikki altíð líka væl. Summi leggja heldur onki í, hvussu rætt tað er, sum tey leggja út.

Skrivar tú stíl um eitt evni, sum er trupult, spyr teg tá fyri, hvørjar síður eru mest eftirfarandi. Tú kanst spyrja læraran og onnur - og nýta tín sunna fornuft. Minst til at kanna fleiri keldur.

Tú snýtir bara teg sjálvan, um tú kopierar stílar beinleiðis av netinum. Best er at gera arbeiðið sjálvur!



TAÐ PASSAR! Í Avstralia rennur vatnið niðan gjøgnum áirnar og ikki sum hjá okkum, oman gjøgnum tær. Hetta tí landið er hinumegin Ekvator. Skilir tú? Eg sat og surfaði á netinum í gjár. Og tað var har, eg las tað. Eisini kundi eg vinna ein Ipod, men eg vann hann ikki. Tey søgdu annars, at tað var so lætt??

ÁBYRGDIN er TÍN!

Trygg kelda?
Tú hevur ivaleyst leitað eftir upplýsingum á Google, tá tú hevur gjørt skúlaarbeiði. Kanska komu hundraðtals síður fram, tá tú sendi leitiorðið avstað. Og tað er alt annað enn lætt at vita, hvørjar síður tú skalt velja. Hvat er ein álítandi kelda? Hvør hevur skrivað tilfarið og lagt tað út? Nær varð tað gjørt? Kann talan vera um gamla upplýsing, sum ikki er galdandi longur? Ver kritiskur, tá tú leitar eftir svarum á netinum. Ikki alt er rætt.

Hvar fanst tú tað?
Tá tú tekur upplýsingar niður av netinum og nýtir tær í skúlauppgávum, ella í øðrum sambandi, eigur tú altíð at skriva niðanfyri, hvørjar keldu tú hevur nýtt. Nógv skriva orðið Google sum kelduávísing, men Google er bara ein leitimaskina, sum hálar upplýsing fram frá øðrum síðum. Tí mást tú fara eitt stig víðari at finna ta veruligu kelduna.

Hygg eftir hvør hevur skrivað upplýsingarnar, sum tú lesur – minst til, at øll kunnu leggja út á netið.

Lokkandi lýsingin?
Bókstavirnir leypa næstan á teg við lyfti um, at trýstir tú á gula fýrakantin, ja, so kanst tú lættliga vinna ein Ipod. Tað er so lætt, trýst bara á... Men hvat er tað veruliga sum hendir, tá tú trýstir á fýrakantin. Í øllum førum kann sigast, at kjansurin at vinna ein Ipod er sera lítil. Hinvegin er kjansurin stórur fyri, at í tí løtu tú trýstir á fýrakantin, so er onkur aftanfyri, sum skrásetur tína teldu. Ein cookie, ið er ein lítil fíla, verður plantað i minnið á telduni, og harvið kunnu tey fylgja tínari ferð á netinum og skráseta upplýsingar um teg. Upplýsingarnar kunnu brúkast til at senda tær lýsingar við tilboðum um at keypa ymiskt.

Freistandi at lata seg lokka!
Allastaðni eru lýsingar! Onkrar leggur tú merki til og aðrar ikki. Lýsingar kunnu vera í teimum filmum, tú sært, teimum spølum tú spælir á netinum, og tí mást tú vera kritiskur og vakin fyri at kunna fanga, at í veruleikanum er talan um eina lýsing.

Í gratisforritum, sum tú kanst nýta til spæl, tekning og annað stuttligt, kunnu onkuntíð vera spiónforrit ella virus, ið kunnu skaða tína teldu. Trupult kann vera at leggja til merkis slík forrit og at sleppa av við tey aftur.

HVAT HELDUR TÚ?

Hevur tú nakrantíð funnið upplýsing á internetinum, sum var skeiv? Visti tú, hvør hevði gjørt tilfarið?

Hevur tú verið úti fyri, at knappliga koma lýsingar upp á telduskíggjan og órógva teg. Hví heldur tú, at lýsingar verða nýttar soleiðis? Kennir tú nakrar heimasíður við spølum, sum fyritøkur hava gjørt, ið vilja selja tær okkurt? Hvørjar?

Hevur tú nakrantíð roynt at keypa á netinum? Fekst tú tað, sum síðan lovaði?

UPPGÁVUR:

Hvussu nýta tit upplýsingar av internetinum í skúlauppgávum? Vita, um skúlin hevur reglur fyri, hvussu tit nýta slíka upplýsing.

Finnið út av hvat orðið "Upphavsrættur" merkir.

Farið inn á tær tríggjar heimasíðurnar, sum næmingarnir í flokkinum vitja oftast í frítíðini. Eru lýsingar á hesum síðum?

Veljið tríggjar lýsingar á heimasíðunum og tosið um innihaldið. Hvat í tykkum royna lýsingarnar at ávirka? Er tað týðiligt, at talan er um lýsing?

Veljið ein film, sum tit hyggja at í felag. Roynið at finna goymdar lýsingar, so sum mat, klæðir, bilar og annað.

TÍDINDA KASSIN

Brúkaraumboðið hevur gjørt eina vegleðing um, hvussu lýsingar, sum venda sær til børn, skulu vera.

Vegleiðingin um marknaðarføring mótvegis børnum og ungum kann lesast á heimasíðuni hjá brúkaraumboðnum.

www.bruk.fo

ORÐABÓKIN

kelduávísing = at skriva, hvar tú hevur fingið upplýsingarnar frá.

kritiskur = at seta spurning við upplýsing, kanna, at tað er, sum upplýst verður.

brandmúrur/firewall = forðar óynsktum vitjanum í telduna, til dømis um onkur uttanífrá roynir at logga seg á.

antivirusforrit = forrit í telduni, ið finnur og strikar virus.

FÁ TAÐ BURTUR!

1 Soleiðis strikar tú óynsktar upplýsingar um teg sjálvan:

Tosa við persónin, sum hevur lagt persónsupplýsingarnar út. Sært tú hvør tað er, sum hevur lagt upplýsingarnar út, set teg tá í samband við viðkomandi og fá hann ella hana at taka tær burtur aftur.

Framvegis trupulleikar?

2 Tosa við internetveitaran

Tað kann vera, at internetveitarin kann hjálpa tær. Vilt tú vita hvør ið eigur eitt ávíst føroyskt økisnavn, kanst tú leita á heimasíðuni hjá FO-umsitingini www.nic.fo

Álvarsamir trupulleikar?

3 Set teg í samband við løgregluna

Heldur tú onkrar upplýsingar vera so skelkandi, at tú vilt hava tær av netinum beinanvegin, eigur tú at seta teg í samband við løgregluna og melda tilburðin.

Eru trupulleikarnir ikki so álvarsamir?

4 Set teg í samband við Dátueftirlitið

Tú kanst seta teg í samband við Dátueftirlitið fyri at fáa ráðgeving um, hvussu upplýsingar kunnu strikast av internetinum. Dátueftirlitið hjálpir tær eisini í øðrum spurningum viðvíkjandi persónsupplýsingum.

10 GÓÐ RÁÐ um góða siðvenju á netinum

1. Gev ongantíð einum, tú ikki kennir, navn og bústað tín
2. Tú kanst hava eitt kelinavn ella geva teg út fyri at vera onkur annar, um tú bert hevur góðar ætlanir
3. Minst til, at tann tú kjattar við, ikki altíð er tann, hann ella hon sigur seg vera
4. Ikki siga nakað, sum tú ikki meinar, tí tað kann enda galið, um tann tú sigur tað við, ikki skilir tað
5. Tú mást ikki málbera teg rasistiskt, tí tað er í roynd og veru ólógligt
6. Ikki arga nakran við teirra útsjónd, tí tað kann vera ógvuliga særandi
7. Lat vera við at happa ella arga onnur, tí tað kann vera ógvuliga særandi
8. Hugsa teg um, áðrenn tú sendir ein teldupost ella sms, tí tá móttakarin hevur sæð hann, vendist ikki aftur
8. Ikki hótta onnur fyri stuttleika, tí tað kann vera trupult at finna útav
10. Ikki halda onnur uttanfyri, uttan so at tú hevur eina góða grund

Reglurnar eru gjørdar av Medierådets børneambassadør **www.medieraadet.dk**

Persónsvernd ber við sær, at reglur eru fyri, hvussu onnur kunnu nýta upplýsingar um teg. Vónandi ert tú blivin meira tilvitaður og hevur fingið eitt betri grundarlag fyri at gera av, hvørjar upplýsingar tú vilt lata øðrum, og hvørjum tú letur upplýsingarnar.

Tað er okkara vón, at hóast tað ofta kunnu vera føri, tú ikki hevur fult ræði á, ert tú kortini blivin eitt sindur tryggari. Tí í flestu førum er tað í roynd og veru tín avgerð.

FLEIRI UPPLÝSINGAR?

Á www.datueftirlitid.fo kanst tú fáa fleiri upplýsingar og her eru eisini áhugaverdar slóðir til ymsar viðkomandi upplýsingar um hetta evnið.

Tú kanst eisini seta teg í samband við Dátueftirlitið á telefon 309100,
ella á post@datueftirlitid.fo

TAÐ ER TÍN AVGERÐ 2